

# Øssur Mohr í Leikalund

Fríggjadagin letur upp framsýning í Leikalund í Klaksvík við nøkrum av nýggjastu málningunum hjá listamanninum Øssuri Mohr. Myndevnið er í høvuðsheitum tað, sum Øssur Mohr er so kendur fyri - nevniliga sermerkta ljósspælið í náttúruni kring Fuglafjørð. Samstundis sum listamaðurin er trúfastur móti sínum myndevni, sæst ein støðug listarlig menning í myndunum, sum seinnu árini eru vorðnar alt meir abstraktar. Framsýningin í Leikalund letur upp fríggjadagin 5. desember klokkan 16. Fernisering er frá 16 til 18. Framsýningin hongur uppi allan desember mánað

# Takk fyri lán

**Sum eitt slag av afturgjalding fyri lánið, ið føroyingar hava veitt íslendingum, hava trý universitet boðið føroyingum ókeypis pláss. Trý pláss á Háskólinn Reykjavík, tvey á RES á Akureyri og tvey á Bifrost, ið liggur norðanfyri Reykjavík. Talan er í øllum førunum um universitets útbúgvingar**

ÍSLANDSLÁNIÐ

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað er ikki gloymt, at føroyingar hava latið íslendingum eitt lán. Trý íslendsk universitet bjóða nevniliga føroyingum ókeypis pláss á universitetunum, sum takk fyri lán.

Talan er um eitt universitet í Reykjavík, eitt beint norðanfyri og eitt á Akureyri, ið bjóða Føroyingum tvey og trý ókeypis pláss í part. Vanliga plaga hesi pláss at kosta pening.




*Kristin Olafsdóttir og Margrét Jónsdóttir eru í Føroyum fyri at greiða frá ókeypis universitets plássunum, ið íslendingar bjóða sum takk fyri lán*

*Mynd: Jens K. Vang*

### Háskólinn Reykjavik

Talan er um trý pláss, á universitetinum í Reykjavík. Undirvíst verður í vinnu, løgfrøði, teldum, verkfrøði, almannaheilsu. Har er ítróttur eisini íroknað, men mann fær ikki stað at búgva.

- Vit vóna at fáa trý føroysk lesandi, ið kunnu lesa púra ókeypis á okkara skúla, men vit fara at velja trý tey bestu, sigur Margrét Jónsdóttir, ið er í Føroyum umboðandi skúlan. Hon leggur afturat, at orsøkin til, at tey eru í Føroyum, er at takka føroyingum fyri at vera tey fyrstu at reagera upp á íslendsku kreppuna.

Hon metir eisini, at Ísland er upplagt sum lestrarland fyri føroyingar, tí tætt sambond hava altíð verið millum londini, og málini líkjast rættiliga nógv.

- Vit bjóða undirvísing í íslendskum áðrenn skúlabyrjan, so tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki, men vit hava eisini útbúgvingar á enskum, greiðir Margrét Jónsdóttir frá. Hon metir eisini, at altjóðagerð eisini handlar um at knýta tættari bond við nábúgvarnar.

### Bifrost

Er ein skúli beint norðanfyri Reykjavík. Tað tekur ein og ein hálvan tíma at koma til høvuðsstaðin, og skúlin er tað einasta í økinum.

- Vit bjóða tveimum føroyskum næmingum fult uppihald á skúlanum hjá okkum. Tann lesandi býr á skúlanum og skal hvørki gjalda fyri at búgva ella fyri útbúgvingina, sigur Kristin Olafsdóttir, ið umboðar Bifrost á túrinum í Føroyum. Hon leggur afturat, at uppskotið er íkomið, tí føroyingar altíð hava verið hjálpsamir mótvegis íslendingum, tá teir hava havt trupulleikar.

Á skúlanum er tað sum á Háskólinn Reykjavik, at stórur partur av undirvísingini er á enskum, á hesum altjóða universitetið.

- Eg vóni bara vit fáa nakrar dugnaligar føroyingar, ið kunnu fáa nógv burtur úr skúlanum hjá okkum, sigur Kristin Olafsdóttir

### Akureyri

Plássini á Akureyri eru á RES, ið er styttin fyri The School for Renewable Energy Science. Tey vilja lata føroyingum eitt til tvey pláss at luttaka í útbúgvingini hjá teimum innan varandi orkukeldur. Talan er um útbúgvingar á master støðið.

Møguleiki verður at hoyra meira um allar hesar møguleikar í Miðlahúsinum í morgin, mikudagin, frá klokkan 19:30.

**Solar Føroyar**
Deildarleiðari søkist

Um tygum hava útbúgving innan HVS vinnuna er nú møguleiki at gerðast deildarleiðari á okkara HVS deild.

**Arbeiðið umfatar**
- Ábyrgd av at stovna og menna HVS deildina
- Ábyrgd av dagligum rakstri
- Tøkniliga ráðgeving

**Førleikakrøv**
- Vitan og førleika innan HVS
- Leiðsluroyndir
- T-kunnleika

**Nærri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Finn Jørgensen, tel. 357933 ella teldupost finn@solar.fo

solar FØROYAR

Brekkutún 2
Hoyvík
Tel 35 79 33
Fax 31 78 90
finn@solar.fo
www.solar.fo

Ítróttarsosialurin
– vit eru har tað hendir

